# nkakynstri






tveimum triðingunum av partapengunum, er kortini bara fyrsta stigið í tilgongdini. Skal eftirfylgjandi gongdin stuðla upp undir somu strategi, so má Fíggingargrunnurin royna at tryggja sær, at eigaraskarin framvegis verður so smábýttur sum gjørligt, tá síðsti triðingurin verður seldur. Men valla ber til í nógv ár aftrat at forða fyri, at partaeigararnir verða freistaðir til at selja ognarrættin til onkran av útlendsku bankunum, sum kanska framvegis verða áhugaðir.

Er tann sølukursurin tá munandi hægri, enn úrvaldi skarin keypti partabrøvini fyri, hevur Landsstýrið avhendað bankan ov bíliga í fyrru søluni. Verður sølukursurin lægri ella tann sami, er ætlanin um at varðveita føroyskt bankakynstur miseydnað, og tá er ætlanin púrasta óneyðug og eisini miseydnað, tí tá verður fíggjarmarknaðurin integreraður við umheimin kortini.

Einasta væleydnaða úrslitið verður, um tað í rættuliga nógv ár eydnast at halda útlendskar bankar burtur av føroyska fíggjarmarknaðinum og varðveita bankan í hondunum fíggjargrunnunum. Og so má man spyrja – er tað ætlanin?

Hví ræðast strategiskar íleggjarar?

Varð bankin boðin heilur til sølu, hevði kanska Danske Bank ella íslendski Landsbankin farið við sigrinum og bankin hevði tá verðið dótturfelag teirra í Føroyum. Menningardeild, roknskapardeild, KT deild, fyristøða annars og servitanardeildirnar høvdu verið minni ella høvdu als ikki verið í Føroyum. Føroyska dótturfelagið hevði fingið atgongd til allar sertænasturnar í onkrum høvuðssæti í Keypmannahavn ella Reykjavík. Deildin í Føroyum hevði bara havt kundarnar at hugsa um, og so ráðgivið høvuðssætinum um kappingina við hinar bankarnar í landinum.

Hetta er eisini orsøkin til, at stórir útlendskir bankar høvdu viljað goldið meira fyri bankan, enn føroyskir fíggjaránarar orka. Stórrakstrarfyrimunir og hollur rótfestur kunnleiki til bankavirksemi seta teir førar fyri at keypa ognina fyri størri prís, enn føroyskir fíggjargrunnar klára.

Meðan hetta kanska ljóðar skilagott í oyrunum á onkrum, tykjast politikararnir ikki at hoyra sama ljóðið. Og tí vilja teir heldur selja bankan fyri minni penga – fyri at varðveita bankan á "føroyskum hondum". Fyri ikki at missa serføroyska førleikan í fíggingarkunsti av hondum.


## Shell sóknast eftir tveimum fólkum til umsitingina

### SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Talan eru um starv í avgreiðsluni á Viðarnesi í Havn. Í løtuni er arbeiðsøkið í høvuðsheitum:

- Kundaavgreiðsla, serliga um telefon
- Ordramóttøka og koyriplanlegging
- Upprætta nýggjar avtalur og kundar
- Virka fyri meirsølu av vørum og tænastum hjá Shell
- Bókingar og avstemmingar
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

Føroya Shell er í ferð við at umskipa umsitingina. Lyklaorðini í hesum sambandi eru betri og sterkari kundatænasta og umsiting, har dentur verður lagdur á eitt mennandi og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi og førleikamenning.

Talan er um fulltíðarstarv, men ávísir møguleikar eru at arbeiða niðursetta tíð.

**Tann, vit leita eftir**
Hevur royndir í skrivstovuyrkinum, er fyrikomandi og nærlagdur, hevur lætt við at samskifta og hevur góð samstarvsevni. Tað er fyrimunur, um tú hevur royndir í kundaavgreiðslu og dugir at arbeiða við EDV.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum og møguleikum fyri persónligari og yrkisligari menning. Talan er eisini um góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meiri um hetta starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 74 00.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Johnni Poulsen, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo. Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin, 19. mars.

### AVLOYSARI FYRI STJÓRASKRIVARA

Fyri skrivara okkara verður søkt eftir avloysara, fyribils inntil 31.12.2007.

**Starvið**
Talan er um áhugavert starv sum skrivari hjá stjóranum. Harumframt eru fleiri sjálvstøðugar uppgávur at loysa.

**Tann, vit leita eftir**
Hevur royndir við telduarbeiði og dugir at nýta forritini Word og Excel. Góður málkunnleiki, serliga til føroyskt og enskt, gevur fyrimun. Astøðilig útbúgving er fyrimunur, men eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur royndir í skrivstovuyrkinum.

**Vit kunnu bjóða**
Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir, umframt góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Hevur tú hug at vita meiri um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hákun Djurhuus, stjóra, ella Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 74 00.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Hákun Djurhuus, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo. Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin, 19. mars.

REPROZ

**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**